# Fyrstu føroysku gazellurnar heiðraðar

**Smáar og miðalstórar fyritøkur, ið vaksa skjótt, hava stóran týdning fyri samfelagsbúskapin. Tað er ein av orsøkunum til, at www.business-line.fo og Børsen skipaðu fyri vinnufundi í Eik Banka í gjár, har ársins vakstrarfyritøkur (gazellur) vóru funnar og heiðraðar**

BÚSKAPUR
*Hilmar Simonsen*
*hilmar@sosialurin.fo*



Flestu munnu við vilja ella av óvart hava sæð gazellur á Discovery Channel onkuntíð. Tær eru kendar fyri at kunna renna skjótt í langa tíð á savannunum í Afrika ella á grasfløtunum í útsynnings Asiu.

Tað er heldur ikki av tilvild, at gazella verður brúkt sum ímynd av eini vakstrarfyritøku, sum hevur megnað at "runnið" skjótt í eitt fýra ára skeið. Mest grundleggjandi fyritreytin hjá eini fyritøku at verða gazella er nevniliga, at bruttuvinningurin í minsta lagi er tvífaldaður seinastu 4 árini, samstundis sum onki av ársins úrslitum áðrenn skatt hevur givið hall. Ein onnur fyritreyt er, at árliga sølan í minsta lagi er 1 mió. krónur, ella at bruttoúrslitið í minsta lagi er 500.000 krónur.

## Fyrstu ferð í Føroyum

Á vinnufundi, sum varð hildin í Eik Banka yviri við Strond í Havn í gjár, skuldu tríggjar tær skjótast vaksandi fyritøkurnar í Føroyum avdúkast. Stórur áhugi var fyri tiltakinum, sum var tað fyrsta av sínum slag í Føroyum.

Stjórin í Eik Banka, Bjarni Olsen, legði fyri við at greiða frá um gazellufyritøkur og nevndi í sama viðfangi, at Eik Banki í Danmark var á listanum yvir gazellur. Bankin hevur havt trýfaldaðan vøkstur seinasta árið, og stavar umleið helmingurin av samlaðu inntøkunum hjá Eik nú frá virksemi uttan fyri Føroyar.

Næsti røðarin á vinnufundinum var Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship. Hon greiddi í stuttum frá søguligu gongdini hjá felagnum og móðurfelagnum, Eimskip, og hvussu hendan íslendska fyritøkan byrjaði sum eitt lítil flutningsfyritøka, ið einamest flutti fisk inn á meginlandið. Í dag er Eimskip ein av heimsins størstu flutninsfyritøkum, ið goymir og flytir vørur bæði til lands og til sjós. Felagið eigur í dag millum annað ta størstu frystigoymsluna í Kina. Eimskip hevur keypt hópin av fyritøkum upp, eisini í Føroyum – millum annað Hera Thomsen og Skipafelagið Føroyar.

### Gazellur við nógvari ferð

Høvuðsnavnið á vinnufundinum mundi vera leiðandi blaðstjórin og fyritøkustjóri á danska dagblaðnum Børsen, Leif Beck Fallesen. Hann greiddi millum annað frá um 12 tær seinast heiðraðu gazellurnar í Danmark, sum í stóran mun høvdu verið smærri og miðalstórar fyritøkur.

Áðrenn seinasti røðarin, Diana Willemoes, varaforseti í felagnum Børsen Executive Club, fekk orðið vóru tríggjar tær skjótast vaksandi fyritøkurnar í Føroyum kosnar og heiðraðar.

Hesar vinnandi gazellurnar vóru:

Sp/f Jóan Petur Vang, byggifyritøka. Vøkstur seinastu fýra árini: 439 prosent.

Sp/f EL.FO, góðkendur el-innleggjari. Vøkstur seinastu fýra árini: 393 prosent.

Sp/f Selmar Nielsen, arkitektur. Vøkstru seinastu fýra árini: 284 prosent.

Tað vóru www.business-line.fo og danska dagblaðið Børsen, ið skipaðu fyri tiltakinum "Ársins Vakstrarfyritøka 2007" í Eik Banka.

